# Fyrsta stigið til at gera ALS til ein stovn undir landinum

**Verður ætlanin hjá Landsstýrinum sett í verk, er hetta fyrsta stigið til at gera ALS til ein landsstovn og tað góðkennir stýrið fyri ALS ikki. Hinvegin hevur stýrið skotið upp, hvussu trupulleikin kann loysast í sátt og semju**



*Týsdagin høvdu fakfeløg kreppufund um ALS. Týskvøldið hevði stýrið fyri ALS eisini fund og stýriðå sigur, at tað fegin taka gera sítt til, at ein loysn fæst á trupulleikanum, Eitt uppskot kann vera at gera ALS skattskyldugt, so at skipanin framyvir skal betala skatt. Mynd: J.Kr. Vang.*

ARBEIÐSLOYSIS-SKIPANIN
*Áki Bertholdsen*

–Verður arbeiðsloysiskipanin sett á fíggjarlógina, metir ALS stýrið, at hetta verður fyrsta stigið á vegnum til at gera Arbeiðsloysisskipanina til ein integreraðan part av landins fíggjarviurskiftum og tað góðkennir stýrið ikki.

Hetta er ein niðurstøða, sum stýrið fyri ALS kom til eftir fund týskvøldið.

ALS stýrið hevði fund um ætlanina hjá landsstýrinum at seta ALS á fíggjarlógina og at leggja skipanina undir Fíggjarmálaráðið.

Landstýrismaðurin í vinnumálum hevur fingið boð frá løgmanni um at gera fyribils broytingar í lógini um ALS.

Tað er næstan eitt ár síðani, at Fíggjarmálaráðið skrivaði eitt álit, har mett verður, at ALS er í stríði við stýrisskipanarlógina, tí ALS er ein skyldbundin skipan og at tað tí er ein skattur.

Samstundis heldur Fíggjarmálaráðið, at tað er í stríði við stýriskipanina, at ALS stýrið hevur heimild áat broyta ALS gjaldið og at inntøkur hjá skipanini ikki standa á fíggjarlógini.

Og nú hevur landsgrannskoðarin spurt løgmann, hvørji stig hann hevur tikið til at syrgja fyri, at ALS ikki er í stríð við stýrisskipanarlógina.

Hesi boðini hevur hann sent víðari til Bjarna Djurholm, sum umsitur vinnumál og hann kennir seg noyddan at broyta skipanina so at ongin ivi verður um heimildina undir skipanini.

Men hetta hevur vakt mótstøðu, bæði hjá fakfeløgunum, sum tað sæst í hinari greinini her á síðuni, men eisini hjá stýrinum fyri ALS, sum hevði fund um málið týskvøldið.

ALS stýrið heldur, at nú skipanin hevur virkað í 10 ár uttan trupulleikar, eigur tað ikki at verða so bráðneyðugt at broyta hana nú, at tað ikki kann bíða eftirúrslitinum av arbeiðnum hjá nevndini, sum ætlanin var at seta at endurskoða skipanina.

### Fleiri uppskot

Men ALS stýrið sigur samstundis, at metir landsstýrismaðurin framyvir, at tað er neyðugt at gera bráðneyðugar broytingar, hevur tað fleiri uppskot um, hvussu tað kann gerast, uttan at seta ALS á fíggjarlógina.

Eitt nú ber tað til at broyta lógina fyri ALS soleiðis, at tað verður staðfest, at gjaldið er ikki skattur.

Tað ber eisini til at gera ALS skattskyldugt, so at skipanin skal betala skatt framyvir, eins og gjørt er við Realin, tí so kann ALS ikki vera ein landsstovnur.

Løgfrøðingar, sum ALS hevur spurt, eru ikki samdir við Fíggjarmálaráðnum, at ALS gjaldið er ein skattur og at ALS er ein landsstovnur.

– Men uttan at leggja seg út í kjak um hetta evni, heldur stýrið fyri ALS, at uppskotini omanfyri, loysa trupulleikarnar.

– ALS stýrið dugir ikki at síggja nakra orsøk til at tað sama ikki kann gerast fyri ALS, sum er gjørt fyri Realin, sigur stýrið fyri ALS.

# Eingin slingur í valsinum

**– Fakfeløgini fara undir ongum umstøðum at góðtaka, at Landsstýrið ognartekur Arbeiðsloysisskipanina, soleiðis sum ætlanin er, sigur Ingeborg Vinther**

ARBEIÐSLOYSIS-SKIPANIN
*Áki Bertholdsen*



*Týsdagin var kreppufundur, har eini 40 fakfeløg hittust á fundi í Havn og tey eru púra samd um, at Landsstýrið skal ikki fáa sín vilja í ósemjuni um, hvussu Arbeiðsloysisskipanin skal skipast*
*Mynd: J. Kr. Vang*

– Politikararnir sleppa ikki at røra Arbeiðsloysisskipanina.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at Landsstýrið sleppur undir ongum umstøðum at gera álvara av sínum ætlanum um at taka valdið á ALS.

Tí líka mikið, hvussu løgmaður og landsstýrismaðurin í vinnumálum venda og snara tí, tvíheldur hon um, at tað, sum landsstýrið ætlar, er at taka valdið á ALS.

– Skal Arbeiðsloysisskipanin leggjast undir Fíggjarmálaráðið og harafturat koma á fíggjarlógina, soleiðis sum ætlanin er, er tað at taka ræðið á ALS úr hondunum á pørtunum á Arbeiðsmarknaðinum og tað fara vit undir ongum umstøðum at góðtaka, sigur hon.

Týsdagin kallaðu fakfeløgini saman til eitt slag av kreppufundi, har støðan varð viðgjørd eftir at landsstýrismaðurin í vinnumálum boðaði frá, at hann hevði fingið harraboð frá Løgmanni um at umskipa ALS, so at skipanin kemur undir Fíggjarmálastýrið.

Løgmaður hevur fingið at vita frá landsgrannskoðaranum, at av tí at ALS er ein skyldbundin skipan, er gjaldið í skipanina at meta sum ein skattur og tí er tað brot á stýrisskipanarlógina, at skipanin ikki er undir fíggjarmálaráðnum. Tí hevur hann givið landsstýrismanninum í vinnumálum greið boð um at fáa viðurskiftini í rættlag alt fyri eitt.

Eini 40 fakfeløg møttu á fundinum og har var ongin slingur í valsinum, sigur Ingegborg Vinther.

– Vit eru púra samd um, at tað eisini framyvir skulu vera partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum skulu hava ræðið á ALS.

Samstundis heittu feløgini á stýrið fyri ALS um at tryggja hetta.

– Í 10 ár hava partarnir á arbeiðsmarknaðinum bygt ALS upp til tað, skipanin er í dag og vit fara undir ongum umstøðum at góðtaka, at Føroya Landsstýri fer at ognartaka ALS, sigur Ingeborg Vinther. Tað vóru fakfeløgini púra samd um.

Hon sigur, at tá ið kreppan leikaði upp á tað harðasta og ALS varð illa fyri, vildu politikararnir ikki vita av skipanini og tað kemur heldur ikki upp á tal, at teir sleppa at leggjast á hana nú, hon er væl fyri.

### Løgfrøðingar ósamdir

Annars sigur Ingeborg Vinther, at tað er ikki agt, at tað, sum Landsgrannskoðarin sigur, er tann einasti sannleikin.

– Eg veit ikki, hvønn førleika Landsgrannskoðarin hevur at gera løgfrøðiligar metingar av hesum slagi. Vit hava eisini okkara løgfrøðingar, sum vit meta vera líka væl fyri at meta um hendan spurning, og teir eru ikki samdir við landsgrannskoðaran í, at ALS er at meta sum ein skattur og tí eigur at verða lagt undir Fíggjarmálaráðið.

Tað stendur eisini greitt í lógini, at tað er stýrið fyri ALS sum hevur ábyrgdina av skipanini, bæði tað fíggjarligu og tað umsitingarligu ábyrgdina.

IngeborgVinther leggur eisini dent á, at ALS varð til, langt áðrenn stýrisskipanin var til. Somuleiðis varð lógin fyri ALS broytt í løgtinginum í 1997, eftir at stýrisskipanin varð komin í gildi, men at tað var ongin, sum røddi um, at talan var um brot á stýrisskipanina og tískil varð lógargrundarlagið undir skipanini broytt uttan nakað.

Hon vísir á, at løgmaður hevur kent støðuna hjá Landsgrannskoðaranum leingi og tí kundi hann langt síðani havt syrgt fyri, at nevndin, sum ætlanin var at seta at endurskoða skipanina, varð vald og var farn til arbeiðis, ístaðin fyri at koma sum ketta upp úr høvdatrogi beint nú og krevja broytingar alt fyri eitt.

Ingeborg Vinther sigur, at sostatt fara fakfeløgini at gera tað, sum er neyðugt fyri at forða fyri at ALS verður lagt undir Fíggjarmálaráðið.

Enn vil hon ikki siga nakað um, hvat hendir, ger landsstýrið álvara av síni ætlan kortini.

– Stýrið fyri ALS hevur sent landsstýrinun uppskot um, hvussu trupulleikin kann loysast. Verður eisini tað sópað av borðinum er ein nýggj støða og so fara fakfeløgini at hittast aftur fyri at vita, hvørji stig skulu takast frameftir.

Men Ingeborg Vinther útihýsir ikki aðalverkfalli um málið. Hon útihýsir heldur ikki, at Landsstýrið kann verða drigið í rættin, tí hon vísir til, at løgfrøðingar eru ósamdir um spurningin.

– Eg útihysi ongum møguleika. Men eg kann endurtaka, at vit fara at gera tað, sum er neyðugt fyri at varðveita ALS sum eina skipan, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum umsita, og at forða fyri, at skipanin verður løgd undir Fíggjarmálaráðið.



# Ongin vandi fyri gjaldkortunum

**Tað fær ongar avleiðingar fyri gjald- og kredittkortini, um forðað verður fyri, at persónsupplýsingar verða sendar av landinum. Tað sigur Høgni Hoydal landsstýrismaður, sum bara sigur seg fylgja tingsins vilja í málinum um verju av persónsupplýsingum.**

FLYTINGAR
*Ingi Rasmussen*

FR/VISA-kortini eru trygg. Um ein nýggj kunngerð verður gjørd til tess at forða fyri, at persónsupplýsingar fara av landinum, so verða eitt nú FR/VISA-kortið og onnur gjalds- ella kredittkort undantikin.

Tað sigur Høgni Hoydal landsstýrismaður, sum í tinginum mikudagin skuldi svara umfatandi spurningum frá Kristiani Magnussen løgtingsmanni um viðgerð av persónsupplýsingum.

Málið hevur fingið drúgva viðgerð í føroysku fjølmiðlunum í síðstuni. Eitt nú hava óvanligar heilsíðulýsingar verið at sæð frá P/F Elektron og peningastovnunum, sum hava havt til endamáls at verja ta gjaldskipan, sum teir saman við danska PBS nýliga eru farnir undir.

Gjaldskipanin inniber, at persónsupplýsingar vera sendar til Danmarkar at venda, hóast ein lóg sigur, at persónsupplýsingar skulu varðveitast og viðgerast í Føroyum.

Dataeftirlitið hevur givið loyvi til skipanina, men landsstýrismaðurin er ikki nøgdur við tað og hevur tí boðað frá, at ein nýggj, herd kunngerð er í umbúna.

### Misskiljing

Kristian Magnussen úr Javnaðarflokkinum vil eitt nú hava at vita, hvørji sakligatlit, landsstýrismaðurin metir seg hava, tá hann við nýggjari kunngerð »ætlar at steðga Elektron í at samskifta við danskan tænastustovn«.

Høgni Hoydal sigur, at spurningurin byggir á eina misskiljing.

– Eg ætli ikki at steðga Elektron ella nøkrum øðrum í at samskifta við danskan tænastustovn, sigur Høgni Hoydal.

Hann sigur seg bara umboða tingsins vilja og vísir til viðgerðina í Rættarnevndini, tá nýggja lógin var til viðgerðar í løgtinginum. Nevndin álegði landsstýrismanninum at gera kunngerð, sum hevur til endamáls at steðga ella avmarka flutning av persónsupplýsingum. Og hon legði áherslu á, at málið við lógini eitt nú var at fyribyrgja, at peningastovnar flyta sítt edv-samstarv av landinum.

### Trygg gjaldkort

Peningstovnarnir hava víst á, at ein avleiðing av einari herdari siðvenju kann vera, at vælumtóktu gjaldkortini eru í vanda, tí tey innibera, at upplýsingar verða fluttir.

Hesum vísir landsstýrismaðurin aftur. Ætlanin hevur ongantíð verið at skapa nakra órógv um tær skipanir, sum longu virkaðu, áðrenn nýggja lógin kom í gildi, sigur hann.

– Tað hevur ongantíð verið ætlanin at steðga øllum tí samskifti og samstarvi, sum vit í dag hava við umheimin. Í einari nýggjari kunngerð verða ymiskar tænastur beinleiðis undantiknar forboðnum um ikki at flyta persónsupplýsingar av landinum – teirra millum FR/VISA og onnur útlendsk gjald- og kredittkort, slær Høgni Hoydal fast.

# Øll sleppa inn í Sparikassan

**Føroya Sparikassi gongur undan og er ein fyrimynd hjá øðrum stovnum og fyritøkum, sigur Meginfelag teirra brekaðu, sum hevur handað MBF-viðurkenningina fyri í ár. Allar deildir hjá Sparikassanum kring landið verða gjørdar atkomuligar hjá brekaðum**

MBF-VIÐURKENNING
*Ingi Rasmussen*



*Trappurnar eru ongin forðin hjá koyristólum í Føroya Sparikassa. Tað gleðir Lailu Solmunde forkvinna í Rørslubólkinum hjá MBF, sum hevur heiðrað Sparikassan*
*Mynd: Jens K. Vang*

Luttøka á jøvnum føti sýnist at vera málið hjá Sparikassanum. Bygningurin er lagaður so, at rørslutarnað kunnu arbeiða har uttan at verða darvað av fysiskum forðingum.

Millum annað við hesari grundgeving peikaði Rørslubólkurin hjá Meginfelag teirra brekaðu á høvuðsbygningin hjá Sparikassanum Yviri við Strond sum eitt fyridømi hjá øðrum stovnum og fyritøkum í landinum. Fyri tað fekk Føroya Sparikassi handað MBF-viðurkenningina 2002 á altjóða handikapdegnum týsdagin.

### Ongin sjálvfylgja

Endamálið hjá MBF er at virka fyri, at øll í føroyska samfelagnum hava somu rættindi og somu skyldur uttan mun til førleika.

Tað er ongin sjálvfylgja í Føroyum, at rørslutarnað sleppa framat allastaðni, sigur Marjun Sigurðsdóttir, forkvinna í MBF. Eitt nú ber ikki til at sleppa á Fróðskaparsetrið, um tú hevur fysiskt brek, men hugburðsbroytingar eru um at henda og stór framstig eru framd. Sparikassin er eitt talandi dømi um tað.

### Kring alt landið

Bogi Bendtsen, undistjóri í Sparikassanum, fekk handað viðurkenningina frá Marjun Sigurðsdóttir, forkvinnu í MBF. Og hann var sera fegin um herðaklappið.

– Vit eru ógvuliga tilvitað um atkomuvinsemi, tá vit byggja og umbyggja. Tí er tað sera fløvandi, tá MBF leggur til merkis, at vit royna okkara besta, sigur Bogi Bendtsen.

Tað er ikki bara Yviri við Strond, at Sparikassin hevur tikið gáttir burtur, keypt lyftir, sett elhurðar í og sett parkeringsøki av til brekað.

– Málið er, at allir okkara bygningar skulu vera atkomiligur hjá øllum. Vit royna at koma runt og gera allar deildirnar í landinum brúkaravinarligar og eru komin væl ávegis. Í onkrum gomlum húsum kann tað vera trupult, men har royna vit at byggja um og í øllum førum hava eina hædd atkomiliga hjá brekaðum, sigur Bogi Bendtsen.

### Komandi allastaðni

Í sínum grundgevingum leggur Rørslubólkurin hjá MBF dent á, at komast kann í hvørt rúm í húsinum Yviri við Strond. Ongin fysisk forðing er nakrastaðni.

Longu tá komið verður inn á parkeringsplássið er merkt, hvar pláss er til koyristólar. Úthurðin er el-drivin og fer upp, tá tú nærkast. Inni í gongini er eisini el-hurð við kontakt í hóskandi hædd. Lyfta er í húsinum til allar hæddir.

Lagaligt hall er millum samanknýttu bygningarnar, so at koyristólur kann sleppa runt.

Eisini á fyribyrgjandi økinum er Sparikassin frammarlaga. Borðini eru el-drivin, so skiftandi arbeiðsumstøður eru gjørligar, og fólk við fysiskum breki bæði kunnu sita og standa, tá tey arbeiða.

Jákup Jacobsen hevur byggileiðsluna á Føroya Sparikassa, og Árni Winther arkitektur hevur staðið fyri prosjekteringini.

## Fimm uppskot til MBF-viðurkenningina

**Sparikassin:** Hugburðurin hjá Føroya Sparikassa sýnir, at onki verður spart fyri at laga bygningar og annað umhvørvi til tey, sum eru rørslutarnað. Luttøka hjá øllum á jøvnum føti tykist vera málið, og nýggi bygningurin Yviri við Strond er uttan fysiskar forðingar. Fyri tað fekk Sparikassin ársins herðaklapp frá MBF

**Shell:** Við umbyggingini í Gøtudali og á Hálsi hevur Shell fylgt einum konsepti, ið er handikalvinarligt. Rampa er løgd tvørtur um gáttina, skjótihurð er sett upp, støddin á WC er hóskandi til koyristólar og rúmsátt er inni í handilshølunum.

**Svf:** Deyvafelagið innstillaði stjóran í Sjónvarpi Føroya, Mikkjal Helmsdal. Hann hevur víst samstarvsvilja og góðan hugburð í sambandi við deyvasendingar. Serliga eru tey takksom fyri, at Dagur og vika vera teknmálstulkaðar

**Býlingshús:** Ein pápi hevur innstillað starvsfólk og húsavørð á Býlingshúsinum undir Fjalli, tí tey av sínum eintingum hava gjørt eina rampu, so hann kann sleppa inn og eins og onnur foreldur heinta síni børn og vera við til foreldrafundir.

**Mentanarhúsið:** Fleiri uppskotstillarar hava víst á Mentanarhúsið í Fuglafirði fyri góðan atkomumøguleika. Koyristólsbrúkari vísir á, at nógv er gott, men at tað framvegis vantar okkurt í. T.d. ber bara til at sleppa inn á niðaru hæddina.

## Tøkk

Øllum, ið mintust ogum á gullbrúdleypsdegnum, takka ogur hjartaliga.

**Anna og Kaj**

## Tøkk

Øllum, ið mintust meg á 75 ára degnum, takki eg hjartaliga.

**Kaj**